# Fáa einar 200-300 milliónir í undirskoti

**Fíggjarlógin fyri í ár fer at hava eitt undirskot upp á hundraðtals millliónir, sigur, Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri**

FÍGGJARLÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Fíggjarlógin fyri í ár, fer at hava eitt undirskot upp á hundraðtals milliónir.

Tað váttar Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum nú fyri Sosialinum.

Samgongan hevur arbeitt av øllum alvi við at snikka eina fíggjarlóg fyri í ár til.

Men nú er so langt útliðið, at tað verður trupult at gera nakrar serligar tillaggingar á fíggjarlógina, leggur hann afturat.

Hann sigur, at hann miðjar ímóti at leggja uppskotið til fíggjarlóg fyri Løgtingið um 14 dagar.

Hann vil ikki siga nakað um, hvussu botnreglan á fíggjarlógini fer at síggja út.

Men at talan verður um eitt stórt, reytt tal, er hann sannførdur um.

– Talan verður um eitt stórt undirskot, sigur hann. Framskrivingar hava víst, at sum gongdin er nú og onki verður gjørt, fer undirskotið at verða yvir 400 milliónir.

Men so stórt verður tað ikki, leggur landsstýrismaðurin afturat.

Men hann sigur, at talan verður um eitt undirskot uppá hundraðtals milliónir.

– Tað er eitt gott boð at siga, at undirskotið fer at verða onkustaðni ímillum einar 200 til 300 milliónir, sigur hann.

Hann sigur, at undirskotið skal fíggjast við tí, sum stendur í landsbankanum.

– Innistandandi í landsbankanum skal brúkast fyrst, tí at taka lán verður avgjørt síðsti útvegur, sigur landsstýrismaðurin.

### Trupult at skerja útreiðslurnar

Hann sigur, at landsstýrið arbeiðir nú fyri at gera ymsar tillagingar fyri at fáa útreiðslurnar niður.

– Men tað er ógvuliga trupult, tí flestu útreiðslurnar eru lønir og nógvar aðrar útreiðslur eru lógarbundnar. Tað merkir, at tað tekur langa tíð at fáa tillagingar at virka.

– Tað tekur langa tíð at broyta lógirnar og tí verður tað ikki í ár, at vit koma at merkja nakað stórvegis til tær tillagingar, sum vit ætla at gera og sum krevja lógarbroytingar.

– Men ætlanin er so at fremja hesar lógarbroytingar í ár so at vit fáa fulla nyttu av teimum næsta ár.

Hann vil ikki siga, hvørjar tillagingar, ella sparingar, samgongan hugsar um, vil hann ikki siga, tí enn er samgongan ikki liðug at viðgera málið.

Men hann sigur, at ætlanin er ikki at skerja tað, sum vit vanliga skilja við vælferðartænastur.

– Men tað eru tænastur, sum ikki virka eftir ætlan og tær eiga at verða broyttar.

Hann vil heldur ikki nevna, hvat hann hugsart um, tí samgongan er ikki liðug at viðgera málið.

*– Kunnu vit vænta okkum, at samgongan fer at hækka avgjøld, ella at seta fleiri avgjøld í gildi?*

– At hækka avgjøld er tað sama sum at hækka skattin, so tað er ikki ætlanin. Men vit skulu aldrin siga aldrin, soleiðis sum støðan er, tí vit vita ikki, hvussu búskaparliga støðan verður.

Bárður Nielsen sigur, at í Føroyum gongur búskapurin ógvuliga skjótt hvønn vegin.

– Allur búskapurin er bundin at fiskaprísinum, Lækkar hann, versnar støðan í samfelagnum ómetaliga skjótt. Men hækkar hann aftur, batnar støðan líka skjótt aftur og eg ivist ikki í, at fiskaprísirnir fara at hækka aftur. Vit hava ein ótrúliga viðkvæman búskap og trupulleikarnar nú, fáa vit onki gjørt við, tí orsøkirnir til prísfallið eru virðið á dollaranum og støðan á heimsmarknaðinum og tað fáa vit onki gjørt við.

*Tú tosar um at gera tillagingar í fíggjarlógini og at spara. Verður talan um uppsagnir?*

– Nei, tað er heldur ikki ætlanin, tí tað vildi verið at skumpa undir eina afturgongd og sostatt kann tað verða við til at skapa eina óneyðuga kreppu, sigur Bàrður Nielsen.

# Antin lata við skattalætta ella hækkar skattatrýstið

**– Vit ætla at halda fast um skattalættan til tað síðsta, men sum útlitini eru nú, verður tað trupult, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tá ið samgonguskjalið varð undirskrivað, var ein hin fremsti boðskapurin til Føroya Fólk, at skatturin skuldi lækka. Men grundarlagið undir hesum lyftinum er longu farið at ridla, tí samgongan sigur, at búskaparliga støðan samfelagnum er verri enn hon væntaði*

– Vit fara at halda fast um skattalættan til tað síðsta. Men sum støðan er í løtuni, verður tað trupult.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at sum støðan er, kann tað verða ómetaliga trupult hjá samgonguni at røkka ætlanini um at lækka skattin.

Samgongan hevur sett sær fyri at lækka skattin 60 milliónir um árið, ella 240 milliónir tilsamans tey næstu fýra árini.

Samstundis var skattalættin høvuðsboðskapurin hjá sambandsflokkinum í valstríðnum.

Men hóast ein sambandsmaður er settur á kassan, er tað als ikki sagt, at samgongan megnar at halda lyftið um skattalætta.

Herfyri váttaði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fyri sosialinum, at sum støðan er í løtuni, verður tað sera, sera trupult at veita skattalætta.

Og Bárður Nielsen er heldur ikki longur so heilt vísur í, at tað fer at eydnast samgonguni at seta skattalættan í verk.

– Bæði undir valstríðnum og tá ið samgongan varð skipað, vistu vit ikki at støðan í samfelagnum var so vánalig, sum hon er og sum útlitini eru nú, kann tað vera trupult at lata skattalætta, sigur Bárður Nielsen.

Men hann leggur dent á, at samgongan fer at halda fast um fráboðaða skattalættan til tað síðsta.

– Vit hava skrivað í sjálvt samgonguskjalið, at vit skulu lækka skattin og tað halda vit fast um til tað síðsta.

### Skattatrýstið hækkar

Bárður Nielsen sigur, at verður skatturin ikki lækkaður 60 milliónir, førir tað við sær, at skattatrýstið í veruleikan um hækkar.

Tað kemst av, at eftir sáttmálunum fara lønirnar at hækka og tí flyta nógvir løntakarar upp í ein hægri skattastiga.

Bara fyri at halda skattastigan óbroyttan hjá skattgjaldaranum, kostar 60 milliónir. Lækka vit ikki skattin, er talan sostatt um eina skattahækking upp á 60 milliónir.

– Lækka vit ikki skattin, fer skattainntøkan hjá landskassanum sostatt at hækka 60 milliónir, um so er, at ongar aðrar fortreytir broytast.

– Talan er sostatt um eina skattahækking hjá fólki.

Tí heldur Bárður Nielsen, at tað er ikki meiri enn rímiligt at lækka skattin 60 milliónir.

– Lækka vit skattin 60 milliónir, hevði tað sostatt eisini ført við sær, at landskassin hevði fingið tað sama inn í skatti, sum árið fyri, um annars ongar aðrar fortreytir broytast.

– Tað fer ikki at minka um skattainntøkurnar hjá landskassanum, tí samstundis hækka lønirnar.

Men landsstýrismaðurin sigur, at sum útlitini eru nú, er búskaparliga støðan versna og spurningurin verður, hvat ber til.



# Lívið stóð ikki til at bjarga

**Mánamorgunin small skiparin á Kvikki, Hans Oluf Johannessen, um umborð á skipinum, sum var 21 fjórðingar norður úr Kallinum. Tyrlan hjá Sjóbjargingarstøðini fór eftir honum, men tíverri var ov seint. Lívið hjá honum stóð ikki at bjarga**

DEYÐSFALL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Skiparin á Kvikki Hans Oluf Johannessen gjørdist sjúkur umborð á skipinum. Hóast skjótt varð borið at, stóð lívið hjá honum ikki til at bjarga*

Mánadagin andaðist 50 ára gamli Hans Oluf Johannessen úr Klaksvík. Hann var skipari umborð á Kvikki, sum var í fiskiskapi.

Torleif Sigurðsson, reiðari, sigur, at Hans Oluf legðist sjúkur við fepri umborð. Men hann versnaði skjótt, og manningin avráddi tí, at ikki var ráðiligt at hava hann verandi umborð.

Reiðarin sjálvur boðaði alarmsentralinum frá, sum koyrdi boðini víðari til Sjóbjargingarstøðina.

Tyrlan fór úr Vágunum klokkan 10.40 og góðar 20 minuttir seinni var hon á staðnum. Skjótt varð borið at og eitt korter seinni fór tyrlan avstað við skiparanum.

Hon kom til Klaksvíkar, beint áðrenn klokkan var hálvgum tólv, og Hans Oluf varð fluttur beina leið á Klaksvíkar sjúkrahús. Men tað var tíverri ov seint, og hann var deyður, tá hann kom fram.

### Bóru skjótt at

Torleif Sigurðsson sigur, at bjargingararbeiðið gekk sera skjótt og professionelt fyri seg, og hann rósar teimum fyri teirra arbeiði.

– Eg haldi, at tað er sera týdningarmikið at gera vart við, at bjargingararbeiðið gekk bæði skjótt og væl, men tíverri stóð lívið hjá honum ikki til at bjarga, sigur Torleif Sigurðsson, reiðari.

Hann heldur fram, at Kvikk kom inn á Klaksvík um áttatíðina týsmorgunin. Veiðan verður løgd upp, og so síðani verður Kvikk lagdur, inntil viðurskiftini eru fingin uppá pláss.

# Størri várframsýning

**Árliga várframsýningin hjá Listasavni Føroya bjóðar ikki fleiri listafólk enn vanligt. Men nógv fleiri verk eru við á framsýningini, sum í ár tekur væl meiri pláss enn undanfarin**

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Úrvalsnevndini til várframsýningina í ár: Bárður Jákupsson, Kári Svensson og Jóna Rasmussen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kári Svensson, sum er ein av limunum í úrvalsnevndini, sigur, at várframsýningin í ár, er væl meiri umfatandi enn undanfarin ár. Her hugsar hann serliga um, at tey í ár hava lagt seg meiri eftir at geva hvørjum einstøkum listaverki betur pláss.

Verkini eru eisini væl fleiri í tali í ár. Vanliga plaga tey at vera millum 80 og 100 í tali, men í ár verða heili 111 listaverk við á framsýningini, sum letur upp fríggjadagin 6. mars klokkan 16.

Tað er somuleiðis nakað, sum er øðrvísi í ár. Vanliga letur framsýningin upp leygardag, men í ár hava tey so valt at hava ferniseringing fríggadagin. Meðan várkonsertin tó verður leygarkvøldið klokkan 20.

### Færri professionell

Kári Svensson sigur, at nakað væl yvir helvtina av teimum, ið sendu inn, eru tikin burtur. Men hóast tað, so saknaðu tey í úrvalsnevndini fleiri av teimum professionellu limunum.

– Tað er eitt sindur av einum vónbroti, at tað letur til, at fleiri av okkara meira professionellu her á landi, ikki hava lagt seg so nógv eftir at stilla fram til várframsýningina í ár, sigur Kári Svensson, sum samstundis eftirlýsir nakað av nýskapanum frá somu fólkum.

Men hann nevnir tó eina. Rannvá Mortensen, sum hevur nakað nýskapandi og spennandi við á framsýningini.

– Tað eru sjálvandi fleiri við, men tað er ikki fjøldin, sigur Kári.

Várframsýningin letur sum sagt upp fríggjadagin klokkan 16, og hon verður hangandi uppi til tann 28. mars.

# Hugnakvøld í Skálanum

**Stórt hugnakvøld við borðhaldi og dansi í Skálanum verður leygarkvøldið 6. mars klokkan 20**

TÍÐINDASKRIV
*post@sosialurin.fo*

Seinasta vár skipaði Stuðulsfelagið "Dragin" fyri einum hugnakvøldi í Skálanum, og av tí at undirtøkan var so góð, er ætlanin at royna tað aftur og at hava eitt slíkt hugnakvøld leygarkvøldið 6. mars .

Kl. 20 byrjar borðhaldið við smyrjubreyði við føroyskum viðskera. Síðani verður sangur við tónleiki og vónandi eisini okkur skemtiligt undir borðhaldinum. Eisini verður ein stutt framsýning, har "Dansihugni" fer at vísa fram nakar fólkadansir.

Kl. 23 lata hurðarnar upp fyri almennum gamlamannadansi. Í ár er tað tann kendi bólkurin "Lagamenn" úr Hvalba, sum fara at spæla sín frálíka góða, gamla dansitónleik.

Tey, ið ynskja at tilmelda seg til borðhaldið og dansin kunnu ringja á tlf 456661 ella 456282. Tað er ikki neyðugt at tilmelda seg, um ein bert kemur til dansin, sum byrjar kl. 23.

Kostnaðurin fyri borðhaldið og dansin er 180 kr, men fyri dansin er tað 120 kr.



*Aftur í ár skipar stuðlafelagið Dragin fyri borðhaldi og dansi í Skálanum í Klaksvík*